# Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið



**9. - 14. mars verður bíbilski sangleikurin »Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið« framførdur í Norðurlandahúsinum**

SJÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Ein bíbilskur sangleikur um Jósef og brøðurnar og faðir hansara Jákup. Søgugongdin verður lýst við sangum, sum fylgja Jósefi frá tí at brøðrurnir royna at sleppa av við hann, til hoffið hjá Fárao í Egyptalandi, har hann vinnur álit Fáraos, og til aftureiningina við brøðurnar, sum koma til Egyptalands.

Hetta er ein stór og rættiliga áhugaverd verkætlan. Tónleikurin er góður og skift verður ímillum allar møguligar tónleikastílar.

Við í leikinum eru umleið 10 dansarar, 20 leikarar, 20 kórsangarar, 15 tónleikarar og barnakór. Leikurin er hálvan-annan tíma til longdar, í tveimum pørtum við steðgi ímillum.

Leikstjórin Jákup Veyhe, Kórleiðarin Zacharias Sørensen og koreografarnir Jóna Thomsen og Elsa Maria Bærentsen hava teir seinastu tríggjar mánaðirnar miðvíst arbeitt við hesari verkætlan. Saman við sniðgevanum Anna Kristin Bæk og scenografinum Jóannes Gaard verður nú seinasta hondin løgd á listarligu útsjóndina. Verkætlanin er eitt samstarv millum fleiri stovnar, feløg og virki. Felagið Tónaungdómur hevur í samstarvi við Føroya Studentaskúla í Hoydølum, Tórshavnar kvøld- og Ungdómsskúla og Tórshavnar Musikskúla lagt verkætlanina til rættis saman við høvuðsstuðlunum Føroya Banka og Norðurlandahúsinum. Av øðrum stuðlum kunnu nevnast Føroya Tele, Mentamálaráðið og Mentunnargrunnur Landsins.

Frumframsýningin verður týsdagin 9. marts kl. 19.30. Sýningar- verða frá hósdegnum 11. marts til og við sunnudagin 14. marts allar dagar kl. 19.30. Atgongumerki á 150,- eru at fáa í Norðurlandahúsinum, á Kunningarstovuni í Havn og á www.kontoin.fo

Nógvir hentir upplýsingar um leikin fáast á heimasíðuni www.hoydalar.fo/josef, sigur Tónaungdómur í tíðindaskrivi.

## Fakta

**Upprunaheitið er:** »Joseph and The Amazing Technicolor® Dreamcoat«
**Tónleikur:** Andrew Lloyd Webber
**Tekstir:** Tim Rice.
Týtt til føroyskt: Anna Kristin Bæk og Dánial Hoydal
**Leikstjórn:** Jákup Veyhe






# Bilar

Nr. 34 • hósdagur • 19. februar 2004 • 77. árg.

*Nógv verður gjørt, fyri at bilførarin skal hava tað gott. Førarahúsið er so høgt at bilførarin kann ganga upprættur og strekkja seg uttan at skula úr bilinum*



Volvo FH16 610:

# Størsta motorin á marknaðinum

**Mikudagin í seinastu viku lat VR Bilar í Havn ein nýggjan Volvo FH16 til N.A. Tarnsport, sum umboðar fóðurfyritøkuna Skretting í Hvalvík. Bilurin hevur 610 hestakerftir og er væl útgjørdur við t.d. leðursetrum og alufelgum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hesin Volvo FH16 hevur størsta motorin á marknaðinum. Bilurin er samstundis tann einasti av sínum slagi í danska kongaríkinum við fýra akslum og tandemtrekk.

D16C motorurin er en av teimum mest framkomnu á marknaðinum. 16-litrar 6 syl. (2800 nm) við 610 hk og elektroniskari motorstýriskipan, yvirliggjandi knastaksli og fýra ventilar pr. syl. Bilurin hevur 14-trins manuellan girkassa.



*Volvo FH16 hjá Niels Andreas Mortensen í Streymnesi. Bilurin sær gott út við pyntilistum, alufelgum og kromaðum skápum á síðuni*

Nógv verður gjørt fyri at bilførarin skal hava tað gott við t.d leðursetrum og fleiri funktiónum á rattinum, bakkikamera, innbygda GSM-telefon o.s.v. Telefon og radio verða stillað frá rattinum.

Førarahúsið er so høgt, at bilførarin kann ganga upprættur og strekkja seg uttan at skula út. Tvær koyggjur eru, og niðara koyggjan kann gerast um til borð við tveimum setrum, ið kann brúkast sum kontór ella til at fáa sær ein bita.

Uttan er eisini gjørt nógv burtur úr við t.d. alufelgum og kromaðum skápum á síðunum og nógvum krompyntilistum framman.

Niels Andreas Mortensen í Streymnesi, sum eigur og rekur transportfyritøkuna N.A. Transport og umboðar fóðurfyritøkuna Skretting í Hvalvík, skal nýta bilin til at koyra við alifóðri til tey ymisku alibrúkini. Bilurin skal hava fóðurtanga og ein avtakiligan krana til endamálið.



*VR Bilar handaðu eigaranum eina bukett tá hann kom eftir bilinum: f.v. Niels Andreas Mortensen frá N.A. Transport, Torleif Nón verkførari og Eyðun Lisberg, sølumaður hjá VR Bilum*

## 1. millión Octavia



17. februar 2004 fór Skoda Octavia nr. 1 millión av samlibandinum á verksmiðjuni í Mladá Boleslav í Kekkia. Octavia kom á marknaðin í 1996 og var fyrsti Skoda sum var fult á hædd við evropeisku kappingarneytarnar bæði hvat kvaliteti, útgerð og koyrieginleikum viðvíkur.

*Kelda: www.semler.dk*

## Yaris D-4D og Fabia diesel



Nordjyske Stiftstidende gjørdi eina test av seks ymiskum smáum dieselbilum. Av seks møguligum fingu Toyota Yaris D-4D og Skoda Fabia diesel fimm stjørnur og lógu harvið á odda í hesi test.

*Kelda: Nordjyske Stiftstidende*

## Mazda vøkstur í Evropa



Samlaða sølan av Mazda bilum í Evropa vaks við 26 prosentum í fjør. Orsøkin var, at árini frammundan var sølan sera lítil á fleiri marknaðum, meðan søluliðini vóru umløgd. Til dømis í Danmark vaks sølan við heili 88 prosentum í fjør.

*Kelda: Motor Magasinet*